**Skúlastýrisfundur**

Dato: 14.01.2014

Tíð: 17.00 – 19.00

Til staðar: Jórun Simonsen, Elspa Petersen, Tummas Marni Joensen, Heri Müller, Turid Vang Frederiksen og Høgni Warberg

Andrea á Rípuni møtti ikki til fundin vegna sjúku

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenna seinastu fundarfrásøgn
2. Eftirmeta fundin við skúlastýrið í Vestmanna, skrivið til Kvívíkar kommunu
3. Lesa heimasíðuna hjá Kvívíkar skúla
4. Fíggjarætlanin fyri 2014 (Fíggjarætlanin er viðfest hesum telduposti).
5. Planleggja várið 2014
6. Ymiskt

Att 1: Seinastu tvær fundarfrásagnir góðkendar, og tær verða í næstum lagdar út á heimasíðuna

Att 2: Vit tosaðu um fundin hjá Skúlastýrunum í ávikavist Kvívíkar- og Vestmanna skúla. At tað var gott, at hetta legði upp til samstarv millum báðar skúlarnar. Næsti fundur millum bæði skúlastýrini er longu avtalaður og tíðarásettur at verða tíðliga í næsta skúlaári. Eftir fundin í Vestmanna varð skriv sent til Kvívíkar kommunu viðvíkjandi at bøta um busssambandið millum Kvívík og Vestmanna. Í tí sambandi ætlar Høgni eisini at tosa við kommununa um møguleikan fyri, busstíðirnar kunnu broytast, soleiðis at bussurin fer úr Kvívík eitt sindur seinni enn kl. 12:30.

Att 3: Vit tosaðu um at lesa og hyggja eftir heimasíðuni til næstu ferð, og gera okkum tankar um, hvat skal tillagast á heimasíðuni. Til næsta fund rættar Høgni í skrivinum um meginreglur fyri skúlan, tí summi ting eru skeiv og annað er ov gamalt. Vit tosaðu eisini um at leggja farvumyndir út og sum heild at fáa heimasíðuna at síggja meira dragandi út, soleiðis at heimasíðan kann vera við til at hugtaka lærarar og fáa fólk at umhugsa at flyta til Kvívíkar. Kommunan hevur ætlanir um at fornýggja sína heimasíðu og í tí sambandi er vert at tosa við kommununa, um hetta kann samskipast.

Att 4: Fíggjarætlanin var á fundinum góðkend. Høgni ætlar at spyrja kommununa um eykajáttan til nýggjar næmingateldlar. Høgni kannar nú hvørjar teldlar skúlin so skal keypa. Landsroyndin 2014 verður talgildað, og næmingateldurnar, sum skúlin nú hevur eru als ikki nøktandi. Vit tosaðu um møguleikan fyri onga svimjing at hava í juni til tess at spara pengar til teldlar.

Att 5: Vit hava skúlastýrisfund aftur týsdagin 4. mars kl: 17:30, og síðan týsdagin 8. apríl kl. 17:30. Høgni fer á námsfrøðiligum fundi at tosa við lærararnar um skúlin kann hava ein garðdag / útidag / hugnadag einaferð í mai-juni, og skúlastýrið kann hjálpa til í samband við ein slíkan dagin.

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, Skrivari